# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Tað týdningarmesta eigur at standa fremst

Nógvir bóltar eru í luftini um stóru spurningarnar fyri Føroya framtíð. Í morgin verður skipað fyri ráðstevnu um ES í Norðurlandahúsinum. Løgtingið heldur stevnuna vera so mikið áhugaverda, at alt tingið fer at lurta eftir Thorvaldi Stoltenberg og hinum fyrilesarunum.

Spurningurin, sum verður viðgjørdur í morgin, er í tráð við eitt av málunum, sum skiftandi samgongur hava sagt at vera millum tey týdningarmiklastu. Skulu Føroyar gerast limur í EFTA, skulu Føroyar gerast sjálvstøðugur limur í ES, ella skulu Føroyar gerast limur í ES sum partur av danska kongaríkinum.

Nógv mál liggja í tinginum og bíða eftir at verða viðgjørd. Millum hesi eru uppskot um, hvussu europeiska framtíðin hjá Føroyum skal skipast, hvussu stjórnarskipanarlógin skal broytast, og fleiri uppskot eru um broytingar í vallógini.

Tað kennist ilt at finna tráðin, nú uppskot ella heldur hugskot eru á tingborði, uttan at yvirskipað ráðlegging er grundarlagið.

Serliga eyðsýnt er hetta, tá ið grein 25 nevndin, sum arbeiðir við stjórnarskipanaruppskotinum, og sum allir flokkar í tinginum eru umboðaðir í, er komin væl á leið við sínum arbeiði. Arbeiðslagið sigst vera gott, og hóast tað enn ikki er greitt, um nevndin verður liðug fyri summarfrítíðina, ella um tað verður neyðugt at halda fram eftir Ólavsøku, so verður tosað um endaliga staðfesting í 2010.

Útgangsstøðið er álitið, sum varð handað løgmanni upp undir jól í 2006. Sjøtul varð settur á arbeiðið í 1999. Tað vil siga, at embætisfólk og aðrir serfrøðingar og politikarar hava sitið við hesum í tíggju ár. Áðrenn nevndin í 2006 legði síðstu hond á álitið, varð skipað fyri upplýsandi fundum kring landið, og ábendingar vóru um fólksliga forankring, tí kunningin gekk væl, og hugurin at spyrja og diskutera var stórur.

Tá ið tað nú hetta væl ílidna uppskotið endaliga er á veg ígjøgnum politiska høvulin, so hevði tað verið rætt og rímuligt, at hinir stóru spurningarnir bíðaðu, inntil úrslitið av hesum arbeiðnum er tókt, og Føroya fólk vónandi hevur tikið tað til sín.

Lógin ætlast at avloysa stjórnarskipanarlógina frá miðskeiðis í níti árunum, og innihaldið fevnir eisini um meiri enn tann lógin ger. Í formælinum í álitinum frá 2006 verður sagt, at einki kann sløkkja sjálvræði landsins ella sjálvsavgerðarrætt okkara, samstundis sum staðfest verður, at Føroyar hava í øldir samstarvað við onnur lond og ríki.

Um tað í politisku skipanini og millum fólk verður breið semja um uppskotið, sum grein 25 nevndin nú arbeiðir við, so hevði verið hópin lagaligari at arbeitt við so mongum øðrum spurningum. Tað kennist ikki sørt órógvandi, at fatanin av, hvussu stóran týdning hetta arbeiðið eigur at hava, so at siga á ongan hátt sæst aftur í næstan hissini viðgerðini av málunum, sum eru nevnd omanfyri, og sum so ella so eru partur av stýrisskipanini. Politikararnir eiga at taka til sín, at tað týdningarmiklasta fyri bæði teir og allar føroyingar eigur at standa fremst.

**Sosialurin**

**Revolvarapolitikkur hjá Almannastovuni:**

## Sjey starvsfólk uppsøgd á Barnaheiminum

**Almannastovan sparir í hvussu er ikki upp á krútið. Sjey starvsfólk hava fingið valið ímillum at skriva undir blankt pappír frá Almannastovuni um nýggja starvssetan, ella at vera uppsøgd**

Sum liður í "sparing" hevur Almannastovan avgjørt at seta ein nýggjan leiðara fyri virksemi á familjudeildini á Barnaheiminum, sum Almannastovan vil yvirtaka. Sjey starvsfólk á Familjudeildini á Barnaheiminum hava í hesum sambandi fingið valið ímillum at verða uppsøgd ella at koma í eitthvørt annað starv undir Almannastovuni.

Trupulleikin er bara tann, at tey sjey – uttan at kenna starvsinnihald, løn, arbeiðstíð ella nakrar aðrar treytir yvirhøvur – skulu skriva undir upp á at geva avkall upp á síni starvsrættindi, sum tey nú hava.

Almannastovan vil ikki hvørki tryggja teimum arbeiðstíð, arbeiðsinnihald, løn ella nakað annað, sum starvsfólkini eiga eftir galdandi sáttmálum.

Undirritaði fakfeløg hava biðið um at fáa nærri útgreiningar av starvstreytunum undir Almannastovuni, men hetta er sýtt okkum við teirri grundgeving, at einki kann sigast um hetta, fyrr enn ein nýggjur leiðari er settur fyri økið. Vit hava síðani biðið um útseting til støðutakan til "tilboðið" frá Almannastovuni, men eisini hetta er sýtt okkum. Tey skulu skriva undir treytaleysa blanka starvssetan hjá Almannastovuni!

Hvørki feløgini ella starvsfólkini siga, at ongar broytingar ella tillagingar skulu gerast. Tað vit týhalda um er, at tað skulu vera virðiligar mannagongdir og limir okkara hoyrdir og tiknir við upp á ráð, so tað vera gjørt við skili og á rættan hátt.

Í sáttmálunum hjá undirritaðu fakfeløgum stendur, at um radikalar broytingar eru í starvsfólkaviðurskiftum so skal fakfelag og starvsfólk verða við í hesari tilgongd, men tað er so ikki tað feløgini kenna til.

Vit átala harðliga, at Almannastovan rekur slíkan revolvarapolitikk móti okkara limum.

**Vinarliga**
Starvsmannafelagið
Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
Føroya pedagogfelag

## Skúvoyingar eiga onkran góðan!

**HARRY JENSEN**
Skúgvi

So mikið er álitið millum okkum sum her búgva, og landsmyndugleikarnar, at nú Løgtingið hevur játtað pening til projektering og til gerð av nýggjari havn í Skúgvi, so kunnu landsmyndugleikarnir ikki taka játtanina frá okkum aftur.

Tað var gleðisrómur í oynni, tá fíggjarlógin fyri 2009 varð samtykt. Aftaná ótolandi havna og samferðsluviðurskifti í mong ár. Aftaná at skiftandi kommunustýri høvdu stríðst og strevast fyri nýggju havnini. Aftaná støðuga afturgongd í fólkatalinum í nógv ár, sá loksins út til at vón var fyri stavn. Nú skuldi vónin aftur flotast, tí nú varð peningur settur av á landsins fíggjarlóg av einum samdum løgtingi. Við c-átekningi kundi ikki vendast við aftur og hart tiltrongda havnin skuldi gerast veruleiki.

Ella er tað ikki so? Tí hóast samt løgting hevur samtykt fíggjarlógina, so ljóðar nú í fjølmiðlunum, at okkara nýfødda gleði og lívæðr, komandi havnin í Skúgvi, skal takast frá okkum aftur. Ongin sum spyr seg fyri hjá okkum. Ongin sum hugsar um hvussu nógv hesar støður, sum vera tiknar í Havn, kunnu ávirka okkara vón um framtíðina. Okkara møguleika sum partur av føroyska samfelagnum.

Vit góðtaka ikki at vera slongd sum tongul í brimi, av politiska sirkussinum í Føroyum. Tað má og eigur at bera til at hava álit á løgtingslógum, samtyktum av samdum Løgtingi, annars hevur føroyska fólkaræðið ein stóran trupulleika. Í hesum føri, snýr tað seg um ein lítlan og orkuveikan part av samfelagnum, sum í fjølmiðlunum sigst missa vunnin rættindi. Rættindi sum onnur økir í landinum taka fyri givið, men sum hjá okkum, gjørdust fyrstu fetini inn í framtíðina við samtyktu játtanini á fíggjarlógini 2009.

Enn er vónin ikki farin í kav, her í Skúgvi. Uttan mun til hvat fjølmiðlarnir borðreiða fyri okkum, so vóna og vanta vit at Skúvoyingar eiga onkran góðan í politisku skipanini í Føroyum. So mikið av áliti hava vit á rættarsamfelagið Føroyar.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.